Uppskot
til
løgtingslóg um málráð

Kapittul 1
Stovnurin

§ 1. Málráðið er málrøktar- og málmenningarstovnur, skipaður undir landsstýrinum og sum í virksemi sínum er óheftur av politisku skipanini.

Endamál

§ 2. Málráðið hevur til endamáls:

- at menna føroyska málið,
- at vegleiða og gera av málspurningar,
- at áseta føroysku stavsetingina.

Kapittul 2
Skipan

§ 3. Málráðið er skipað sum umboðsráð og við einari starvsnevnd. Í Málráðið verða í mesta lagi vald 15 umboð, umboðandi stovnar, feløg o.o., sum hava áhuga fyri føroyska málinum. Málráðið situr í fýra ár í senn og kann verða afturvalt.

Stk. 2. Málráðið er mannað við fólki, sum hava málsliga útbúgving ella á einhvønn hátt hava prógvað kunnleika og hegni til føroyskt málstarv.

Stk. 3. Mentamálaráðið tilnevnir limirnar í Málráðið, og landsstýrismaðurin velur millum hesi formann og næstformann, sum hava málfrøðiliga útbúgving.

Stk. 4. Landsstýrismaðurin ásetir neyvari reglur um val av limum í Málráðið og um, hvørjir stovnar og feløg verða umboðað í Málráðnum.

Stk. 5. Skrivstova Málráðsins hevur um hendur dagliga virksemið, sum undir umsjón formansins verður røkt av vísinda- og skrivstovufólki, sum Málráðið setur samsvarandi góðkendum lønarlagi.

§ 4. Málráðið skipar seg við eini starvsnevnd. Í starvsnevndini sita formaðurin og næstformaðurin í Málráðnum og tríggir nevndarlimir valdir millum limirnar í Málráðnum.
Stk. 2. Starvsnevndin hevur fund eftir tørvi, tó í minsta lagi eina ferð um mánaðin. Á fundum sínum tekur starvsnevndin støðu til málspurningar og metir um ta vegleiðing, sum er veitt millum funda.
Stk. 3. Málráðið hevur fund tvær ferðir um árið, har ið yvirskipaðir málspurningar verða viðgjørdir, og framtíðarætlanir verða lagdar.
*Stk. 4***.** Avgerðir, sum Málráðið tekur sambært stk. 2, verða tiknar við vanligum meiriluta.

§ 5. Málráðið almannakunnger frágreiðing frá starvi sínum við árslok. Har verða m.a. týðandi ráð og tilmæli kunngjørd, ið Málráðið hevur givið í árinum. Spurningar og svar verða varðveitt í skjalasavninum hjá Málráðnum.

Kapittul 3
Uppgávur

§ 6. Málráðið gevur landsstovnum og almenningi vegleiðing, ráð og upplýsing í spurningum um føroyskt mál í talu og skrift.
Stk. 2. Málráðið svarar málspurningum frá stovnum og einstaklingum og eigur at hava gott samstarv við stovnar, fjølmiðlar og almennar myndugleikar, ið hava stóra málsliga ávirkan, so sum miðfyrisiting, skúlar og prentaðar, loftbornar og talgildar miðlar.
Stk. 3. Málráðið skal í samvinnu við yrkisbólkar menna gott føroyskt yrkismál.
Stk. 4. Málráðið skipar fyri átøkum málinum at frama.

§ 7. Málráðið savnar og skrásetir nýkomin føroysk orð og máliskur og er til hjálpar at velja og evna til nýggj orð.

§ 8. Málráðið ritstjórnar og greiðir til útgávu eina føroyska stavsetingarorðabók, sum ásetur stavseting, teknseting, stavsetingarreglur o.tíl. Almennir stovnar, sum landsstýrið varðar av, hava skyldu at fylgja teimum reglum, sum Málráðið ásetir. Í sambandi við nýggjar útgávur av stavsetingarorðabókini kann Málráðið gera rættingar og broytingar. Størri og meira yvirskipaðar broytingar í stavsetingini skulu góðkennast av landsstýrismanninum.

§ 9. Landsstýrismaðurin kann áseta neyvari reglur um virksemið hjá Málráðnum.

Samstarv

§ 10. Málráðið samstarvar við Føroyamálsdeildina á Fróðskaparsetri Føroya, so tryggjað verður, at vitan og førleikar, ið eru á málsliga økinum, verða gagnnýtt til fulnar.

Stk. 2. Málráðið samstarvar við Staðarnavnanevnd og Navnanevnd eins og við aðrar viðkomandi stovnar.

Stk. 3. Málráðið samstarvar við aðrar málnevndir og samsvarandi stovnar í hinum Norðurlondunum og sendir umboðsfólk á ársfundin hjá Málráð Norðurlanda.

Skrivstovu- og fundarhald

§ 11. Málráðið hevur egið skrivstovuhald, men kann samstarva við aðrar stovnar.

Stk. 2. Landskassin rindar útreiðslurnar av virkseminum hjá Málráðnum og starvsnevndini.

Kapittul 4
Gildiskoma

§ 12. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2011.

Stk. 2. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 14 frá 7. januar 1985 um reglugerð fyri Føroysku málnevndina.

Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Lógaruppskotið er úrslit av, at eitt samt løgting í september 2009 mælti til við lóg at skipa eitt málráð, ið umboðar ymiskar fatanir, og ið fær myndugleika at gera av málfrøðiligar spurningar. Hetta løgtingsálitið kom í kjalarvørrinum av álitinum Málmørk, sum fyrrverandi Málstevnunevndin handaði landsstýrismanninum í mentamálum í desember 2007. Eitt av mongu tilmælunum í Málmørk var at skipa Føroysku málnevndina sambært lóg, og at nevnd varð sett at endurskoða grundarlagið undir málnevndini og virksemi hennara og gera uppskot til lóg. Málnevndin hevur eisini sjálv sett fram sama ynski. Henda tilráðing er framd. Ein arbeiðsbólkur varð tann 16.03.10 settur at gera uppskot til, hvussu vit skipa okkum við einum málráði, har heimildirnar verða lógarfestar og kunnu tryggja, at vit hava ein sakkønan myndugleika, sum t.d. kann staðfesta eina stavsetingarorðabók, eitt stavrað og annars gera av aðrar málsligar spurningar.

Ein ávísur skriftnormur hevur ment seg síðan á døgum V.U. Hammershaimbs. Hammershaimbsnormurin er vaksin fram hjá einstøkum persónum ella feløgum, ið hava verið virkin á føroyska mentanarøkinum, og hann hevur fingið sína útbreiðslu gjøgnum eitt nú skúlabøkur, orðabøkur, bløð, miðlar, fagrar bókmentir, yrkisbøkur o.s.fr., og við at málmyndugleikin hevur tikið undir við honum. Skriviháttur er sostatt vorðin til sum siðvenja og sum málpolitisk átøk, ið mentafólk hava framt. Tað merkir, at stavsetingin ongantíð er ásett við lóg. Tað einansta átakið, sum tingið hevur ásett, var tá ið Skúlakommisjónin í 1954 sendi boð út til allar skúlar í landinum um at fylgja nøkrum rættskrivingarreglum, sum ein løgtingsnevnd varð komin til. Nevndin æt Rættskrivingarnevnd Føroya løgtings. Sostatt vórður rættskrivingarreglurnar broyttar hetta árið, og tað merkti óbeinleiðis, at myndugleikin staðfesti Hammershaimbsnormin.

Í dag verður tosað um at løggilda latínska stavraðið, men enn er føroyska stavraðið ikki løggilt; tað byggir á siðvenju og verandi skriftnorm. Við lógini um Málráð verður møguligt formliga at løggilda eitt stavrað, stavsetingarreglur og eina stavsetingarorðabók.

Høvuðsendamálið við at seta eitt Málráð er at føra ein almennan málpolitikk, ið tryggjar, at føroyskt kann nýtast á øllum økjum í samfelagnum. Harumframt skal tað regluliga metast um, hvørt broytingar eiga at verða gjørdar, tá um ræður stavseting, málsligar reglur annars og orðafar. Bert eitt væl ment Málráð í samráð við granskingarstovnar okkara kann hava tílíka ábyrgd um hendur.

Málráðið kemur ístaðin fyri Føroysku málnevndina, ið hevur virkað sbrt. reglugerð nr. 14 fyri Føroysku málnevndina síðan 7. januar 1985. Føroyska málnevndin kom tá ístaðin fyri Málstovn Føroya Fróðskaparfelags, ið varð settur á stovn í 1958. Føroyska málnevndin gjørdi í brævi til Mentamálaráðið, dagfest 19.01.2009, vart við, at síðan reglugerðina frá 1985 eru málsligu umstøðurnar ógvuliga nógv broyttar: "Tann føroyski málheimurin hevur ment seg ómetaliga nógv og fevnir bæði í skrift og talu um eina fjøld av nýggjum økjum, sum alsamt gerast fleiri; vit kunnu nevna barna- og ungdómsmentanina, sum eitt nú ítróttur og tónleikur eru partar av; samskiftismentanina við m.a. samferðslu og ferðavinnu; nýggjar vinnur og økt gransking hava øðrumegin tørv á og eru hinumegin fyritreyt fyri vaksandi málsligari menning og røkt. Samstundis er tann málsliga ávirkanin uttaneftir vaksin óendaliga nógv og gerst alsamt sterkari. Og har sum ávirkanin fyrr í stóran mun var avmarkað til kirkju, rætt og skúla – øki, sum tey fæstu tóku lut í dagliga – har er ávirkanin í dag sterkast á øllum økjum, sum almenningurin dagliga tekur lut í – í fjølmiðlum, ikki minst teimum nýggju elektronisku miðlununum, skúlum, ja øllum tí dagliga lívinum í arbeiði og frítíð". Við støði í hesum varð heitt á Mentamálaráðið í fyrsta lagi at nøkta tann bráðneyðuga tørvin á at styrkja skrivstovuna hjá málnevndini (Málstovuna) og í øðrum lagi at taka stig til at fyrireika lóg, sum málnevndin kann virka eftir.

Umframt broyttu málsligu umstøðurnar síðan reglugerðina frá 1985 skal nevnast, at reglugerðin bert gevur málnevndini ráðgevandi heimildir. Eitt annað er, at tað er trupult at arbeiða eftir reglugerðini við verandi játtan til málnevndina. Reglugerðin hevur t.d. ásetingar um, at nevndin hevur skyldu at savna og skráseta orð, men orka hevur ikki verið til at gera hetta arbeiðið á nøktandi hátt.

Fyrimunurin við at skipa eitt málráð við lóg er, at lógin inniheldur ítøkiligar ásetingar um skyldurnar og um heimildirnar hjá nýggja málráðnum. Lógin er lagað til samtíðina og verður eitt tíðarhóskandi útgangsstøði at arbeiða út frá. Í mun til Føroysku málnevndina, ið bert hevur ráðgevandi myndugleika, fær Málráðið heimild at gera av málsligar spurningar. Hetta hevur stóran týdning fyri framtíðar málstarvið, t.d. í sambandi við at gera føroyska stavsetingarorðabók, sum verður ein aðaltáttur í arbeiðinum hjá Málráðnum.

Ásannast má samstundis, at til tess at røkka ætlanini at styrkja málpolitikk landsins, verður neyðugt at styrkja Málráðið, soleiðis at allar tær ymsu uppgávurnar verða røktar til fulnar. Samstarv eigur m.a. at fáast í lag við Føroyamálsdeildina á Fróðskaparsetri Føroya, soleiðis at tann vitan, ið er um føroyska málið og málgranskingina, verður gagnnýtt í mest møguligan mun.

Í dagliga arbeiðinum verður eisini ein eyðsæddur fyrimunur í at samstarva við aðrar nevndir, ið so ella so fáast við føroyska málið. Talan er t.d. um Navnanevndina og Staðarnavnanevndina. Miðað eigur at verða ímóti at hava felags umsiting fyri hesi ráð og nevndir, og at nevndirnar annars stuðla uppundir arbeiðið hjá hvør aðrari.

Hoyring

Hesi hava fingið fingið uppskotið til hoyringar:

Aðalráðini, Fróðskaparsetur Føroya, Føroya Kommunufelag, Føroya Lærarafelag, Føroya Pedagogfelag, Føroya Ungdómsráð, Føroyska málnevndin, Føroysk Miðlafólk, Granskingardepilin fyri Økismenning, Javnstøðunevndin, Kommunusamskipan Føroya, Kringvarp Føroya, LISA, Málfelagið, Móðurmálslærarafelag Føroya, Navnanevndin, Rithøvundafelag Føroya, Staðarnavnanevndin, Vitin.
Uppskotið verður eisini lagt á heimasíðuna hjá Mentamálaráðnum.

Kap. 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

Á fíggjarlógini er frammanundan ein játtan til málnevndararbeiði, sum Málráðið fær sum grundarlag at virka eftir. Fyri at Málráðið skal kunna virka til fulnar, má umsitingarliga eindin tó víðkast, og hetta hevur við sær, at játtanin á fíggjarlógini má hækka. Fleiri fólk eiga at verða sett á skrivstovuna hjá Málráðnum. Sum er, er bert eitt skrivstovufólk í starvi. Kostnaðurin av hesum er tengdur at tali av starvsfólkum, tørvur er á. Í fyrstu syftu eigur í minsta lagi eitt ársverk til ein málfrøðing at verða játtað aftrat. Tá Málráðið er farið at virka, má metast um, hvussu nógv ársverk aftrat eru neyðug.

Uppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

Uppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

Uppskotið hevur ikki sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

Uppskotið fær ikki fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar vegna millumtjóða sáttmálar á økinum.

	Fyri landið/lands myndugleikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss/øki í landinum	Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

Serligar viðmerkingar

Til § 1

Málráðið, ið verður skipað sambært hesi lóg, verður heimilandi stovnur. Høvuðsuppgávan er at kunna og geva ráð um føroyskt mál umframt at granska tað og gera regluskipan. Hugsast kann, at orðabókastarv, sum longu er á Føroyamálsdeildini og uppgávur hjá Málráðnum, umskarast, og tí er samstarv millum Føroyamálsdeildina og Málráðið eyðsýnt.

Til § 2

Til tess at vera við til at menna og vegleiða um málið krevst, at Málráðið fylgir væl við málbrúki og málnýtslu á øllum samfelagsøkjum. Hetta verður lýst nærri undir §§ 6 og 7.

Í arbeiði sínum at menna føroyska málið skal Málráðið geva út stavsetingarorðabók, sum landsstýrismaðurin gevur almenna góðkenning. Málráðið skal harumframt standa fyri javnari dagføring av stavsetingarorðabókini, soleiðis at reglur um stavseting og bending so vítt gjørligt altíð eru dagførdar.

Málráðið fær í dagliga yrki sínum nógvar fyrispurningar frá almenningi, feløgum, stovnum og virkjum. Í hesum sambandi vegleiðir Málráðið og hevur heimild at gera av málspurningar.

Til § 3

Stk. 1 Málráðið skal vera breitt samansett og umboða ymiskar fatanir. Hetta verður tryggjað við at biðja ymiskar stovnar, feløg o.o. gera tilmæli um lim. Á henda hátt verður Málráðið skipað sum eitt umboðsráð, umboðandi tey, ið verða mett at hava áhuga fyri føroyska málinum og/ella verða mett at vera viðkomandi fyri málstarvið. Millum innkomnu tilmælini velur landsstýrismaðurin upp til fimtan limir. Starvsnevndin verður vald millum limirnar í Málráðnum.

Stk. 2 Til tess at Málráðið verður væl fyri at vegleiða og gera av málspurningar, skulu har starvast málfrøðingar og málrøktarfólk, ið hava lokið prógv frá hægri lærustovni, umframt málkøn skrivstovufólk.

Stk. 3 Mentamálaráðið tilnevnir upp til fimtan limir í Málráðið eftir tilmæli frá stovnum, feløgum o.ø., sum tilskilað í stk. 1. Landsstýrismaðurin ger av, hvør skal vera formaður og næstformaður, ið báðir skulu hava málfrøðiliga útbúgving. Eitt nú hesir stovnar og feløg gera tilmæli um limir í Málráðið: Fróðskaparsetur Føroya, Føroyamálsdeildin, Føroya Lærarafelag, Føroya Pedagogfelag, Móðurmálslærarafelag Føroya, Málfelagið, Kringvarp Føroya, LISA, Javnstøðunevndin, Rithøvundafelag Føroya, Føroysk Miðlafólk, Vitin, Føroya Ungdómsráð, Kommunusamskipan Føroya, Føroya Kommunufelag, Mentamálaráðið. Sí eisini viðmerkingar til stk. 4 niðanfyri.

Stk. 4 Landsstýrismaðurin ásetir neyvari í kunngerð, hvussu Málráðið verður samansett og valt, hvussu leingi tað skal sita, og hvussu tað skipar seg.

Stk. 5 Skrivstova ráðsins hevur tilknýti til Fróðskaparsetur Føroya, soleiðis at tann vitan, ið er um føroyska málið og málgranskingina, verður gagnnýtt í mest møguligan mun.

Til § 4

Stk. 1 Formaðurin og næstformaðurin í Málráðnum eru fastir limir í Starvsnevndini, ið virkar sum millumliður millum skrivstovuna og breiða Málráðið.

Stk. 2 Starvsnevndin hevur til uppgávu at umrøða og taka støðu til ymsar málspurningar. Eisini skal Starvsnevndin meta um vegleiðingina, sum skrivstovan hevur givið almenningi, stovnum og øðrum.

Stk. 3 Hálvárligu fundirnir í Málráðnum kunnu t.d. viðgera yvirskipaða málpolitikkin, málslig átøk, o.a.

Stk. 4 Verða mál sett undir atkvøðu, og tað stendur á jøvnum, er formansins atkvøða avgerandi.

Til § 5

Stk. 1 Ársfrágreiðing verður gjørd, soleiðis at arbeiðið, ið fer fram í árinum verður skjalfest og atgeingiligt fyri fólk við áhuga fyri málstarvinum. Ársfrágreiðingin er eisini týðandi partur av skjalasavninum hjá Málráðnum, har spurningar og svar eisini verða varðveitt.

Til § 6

Stk. 1 Ráð, vegleiðing og upplýsing verða givin fyri at menna málið og útbreiða kunnleikan til t.d. nýggj orð og hugtøk og nýggjar ásetingar í stavsetingarorðabókini.

Stk. 2 Í praksis verður tað skrivstovan, ið svarar málspurningum, men Málráðið og harundir starvsnevndin hava yvirskipaðu ábyrgdina av arbeiðnum.

Stk. 3 Skal føroyskt lætt og ómakaleyst kunna brúkast í øllum viðurskiftum í skrift og talu, er tað umráðandi at hava eitt væl ment yrkismál, so at samsvar er millum málið, sum fólk í ávísari vinnu nýta og so tey orð, sum eitt nú orðabøkur mæla fólki til at brúka. Fólk, ið fáast við at týða prosatekst til føroyskt, renna seg mangan í tann trupulleika, at tað er langt millum orð, ið orðabøkur skjóta upp, og so talað mál. Tí er tað av alstórum týdningi, at málfrøðingar støðugt samstarva við yrkisbólkar um at menna gott føroyskt yrkismál.

Stk. 4 Málráðið ger tilmæli til landsstýrismannin um málrøktarvirðisløn. Málrøktarvirðisløninn verður latin persóni ella felagi/bólki, ið hevur verið við til at røkja og ríka føroyska málið. Virðisløninn kann verða latin fyri at hava víst serlig evni til at málbera seg vandaliga og stimbrað eitt livandi og fjøltáttað føroyskt mál. Málrøktarvirðisløninn kann verða latin árliga.

Málráðið skal harumframt skipa fyri kunnandi og upplýsandi tiltøkum, sum almenningurin kann væntast at hava áhuga fyri, t.d. átøkum sum "Ársins nýggjyrði", "Móðurmálsdegi", "Besta handilsheiti", "Besta stovnsheiti", "Týðaravirðisløn".

Til § 7

Málráðið savnar og skrásetur nýkomin føroysk orð og máliskur. Savningin av orðum eigur at fara fram við at nýta miðlarnar, sum eru til taks, t.d. útvarp, sjónvarp, bløð og alnetið. Í hesum sambandi er neyðugt at seta fólk á Málráðnum, sum hevur ábyrgdina av savningini og skrásetingini av

nýggjum orðum. Hetta er í roynd og veru ein granskingaruppgáva, har ið tað empiriska tilfarið verður fingið til vega gjøgnum føroyskar miðlar, bæði skrivaðar og talaðar. Tað er alneyðugt, at henda uppgávan verður tikin í størsta álvara, tí tað er í hesum miðlunum at málið livir og mennist. Á henda hátt verður eitt gott amboð útvegað til at fylgja við, hvussu málið broytist og mennist. Tað krevur at vera ein málfrøðingur, ið hevur hesa uppgávu um hendur á Málráðnum, tí tað krevur fakligt innlit. Ein slík innsavning kann skjalprógva, nær ein málbroyting kemur fyri fyrstu ferð, og innsavningin er tá samstundis eitt gott útgangsstøði fyri dygdargóðum normeringsarbeiði. Í grannalondum okkara verður stórur dentur lagdur á henda partin av arbeiðinum hjá málráðunum. Hetta arbeiðið eigur at verða gjørt í neyvum samstarvi við Føroyamálsdeildina á Fróðskaparsetri Føroya.

Nýkomin føroysk orð og máliskur eru altso ikki bara nýggj orð, sum koma í brúk í føroyskum, men eisini nýggjar máliskur, gamlar máliskur í broyttum hami, nýggjar bendingar, nýggjur syntaksur, nýggjar merkingar av gomlum orðum, nýggjur framburður í loftmiðlunum. Ein slík innsavning og skráseting er tí alneyðug, um føroyskt skal kunna verða skjalprógvað á ein vísindaliga forsvarligan hátt.

Til § 8

Málráðið skipar fyri, at stavsetingarorðabók, ið landsstýrismaðurin góðkennir, verður skrivað. Í dag er eingin løggild orðabók, ið ásetir stavseting, stavsetingarreglur og tílíkt, og við starvsetingarorðabókini verður bøtt um henda tørvin. Tað er eisini uppgáva Málráðsins at syrgja fyri, at tann løggilda stavsetingarorðabókin verður dagførd við jøvnum millumbilum.

Til § 9

Virksemið hjá Málráðnum verður ásett í kunngerð, og henda møguleika eigur landsstýrismaðurin at hava, um so er, at broytingar koma í, sum gera, at neyðugt verður at broyta virksemið hjá Málráðnum innan fyri galdandi lóg.

Til § 10

Stk. 1 Málráðið og Føroyamálsdeildin eru tveir atskildir stovnar, men eiga at samstarva fyri at styrkja arbeiðið og vera hvørjum øðrum at gagni.

Stk. 2 Í arbeiði sínum hevur Málráðið neyvt samstarv við Navnanevndina, Staðarnavnanevndina eins og aðrar stovnar fyri at fáa ein savnaðan og harvið øktan virknað.

Stk. 3 Tað er umráðandi, at samstarvið eisini fevnir út um landoddarnar eitt nú við samsvarandi stovnar í hinum Norðurlondunum.

Til § 11

Stk. 1 Starvsfólkið á Málráðnum og á Føroyamálsdeildini eiga at samstarva, har eyðsæddir fyrimunir eru. Samstarv kann eisini fevna um felags skrivstovuhald við aðrar nevndir, eitt nú Staðarnavnanevnd og Navnanevnd.

Stk. 2 Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum góðkennir samsýningar til formann og starvsnevndarlimir. Formaðurin fær fasta mánaðarliga samsýning. Málráðslimir fáa ikki fundarsamsýning. Serstøk játtan verður á løgtingsfíggjarlógini til rakstur av Málráðnum. Verandi játtan til Føroysku málnevndina verður flutt til Málráðið.

Til § 12

Lógin kemur í gildi 1. januar 2011. Fyrilit verður havt fyri, at nýtt fíggjarár byrjar, soleiðis at til ber at tryggja, at játtanin til Føroysku málnevndina verður flutt til Málráðið og hækkað samsvarandi øktu uppgávunum.

Stk. 2 Reglugerðin frá 1985 hevur havt lógarstatus og verður tí sett úr gildi við hesari lóg.